SOSIALURIN

Nr. 15 — 15. APRÍL 1961 — 34. ÁRG.

Í dag

VÆLFERÐ OG MENTAN

TAÐ er ikki heilt óvanligt at hoyra, at oll hin okonomiska og sosiala trygd, ið nú verður veitt fjoldini av fólkinum, verður at taka hitt mentunnar- og menningarliga stoðið undan okkum. Tað hendir eisini, at ein hoyrir politikkar nevna hetta á politiskum fundum— politikkarar, ið hava hug, men ikki reiðiliga tora at kynda uppundir hina nationalu osingina av nýggjum — hana, ið royndist teimum so stokkut.

MEN tað er væl eingin ivi um, at júst okonomisk og sosial trygd — sonn vælferð — verður at gerast dyggasti stuðul mentunnarlivsins og geva fólkinum eitt haldgott mentunnarstoði at byggja á.

EITT er vist — eingin torir siga, at visindamenn og granskarar vildu rokkið storri úrslitum, um teir dagliga pindust av materiellum sorgum.

HEILDUR eingin torir siga, at tað hevur verið til skaða fyri bæði heimligar og útlendskar mentunnarmenn, at teir hava havt sítt uppi á ti turra.

LAT okkum vara okkum fyri teimum, ið siga vælferðarsamfelagið fara vera okkum óverdugt og til nationala minking — teir unna ikki fólkinum hitt besta.

Sosialurin siga viðmerkingar

SKATTALÆTTI

Vit hava áður greitt frá uppskotum landsstýrisins um beinleiðis skattafrælsi fyri smáinntokur, skatta- og barnafrádrátt, ið vil minka munandi um skattin hjá forsyrgjarum.

Javnaðarflokkurin hevur oftari áður havt uppskot frammi um minkan av skattabyrðurnar hjá teimum lægru inntøkunum eins og uppskot um eina rættvísari skattaskipan.

Einki av hesum uppskotum hava vunnið nakran frama.

Annars hevur fólkaflókkurin einaferð havt uppskot um ein vissan skattalætta, men tó soleiðis at skilja, at tað einans vóru stórmenninir, ið skuldu fáa skatt afturgoldnan úr landskassanum. Hetta varð gjørt í einum uppskoti í 1943, har teir m.a. siga:

»Hesir menn hava frammanundan givið inntøku sína upp til tingið og goldið skatt av inntøkuni; tað er tí beint, at tað almenna stýðjar hesar menn ella hesi felog við at afturgjalda part av tí skatti, sum er goldin til tingið.«

Bókur - blóð

Okkum er sent:

Øll vit, ið eldru eru, minnast, hvussu tað oftani hevur gingist við okkara fræga mentunnarstuðul: »Varðanum«. Kom langt í afturhond og helt mest sum uppat at koma út.

Seinri fingu vit hitt frálíka mánaðarblaðið »GLUGGAN«, men tað tykist sum hetta verður fyri somu lagnu. Longu nú er »Glugginn« komin í afturhond.

Hetta fær ein til at hugsa og spyrja: tá ið nú okkara frægastu mentamenn og ivaleyst saman við teimum mangir, ið fegin vilja stuðla figgjarliga, standa aftanfyri eitt tílíkt tiltak, hvi so alt hetta seinføri.

Lesihugaður.

aðrir siga

»DIMMALÆTTING« skrivar um uppskot Sambandsflokksins um at taka upp samráðingar við Ísland og royna at vinna aftur fiskileiðir, ið Føroyingar mistu við 12 mila markinum og sigur m.a. at

»... **De fleste islandske blade har bragt meddelelsen om Sambandspartiets initiativ på fremtrædende plads. En enkelt avis, som særdeles stærkt har bekæmpet »forliget« men England den radikale »Tíminn«, har bragt den tilføjelse til meddelelsen fra Færoerne, at Sambandspartiet ikke altid har udmælet sig ved venlig indstilling overfor Island.«**

Veruleiki?

TAÐ ER VERULEIKI:

AT undir hesum landsstýrinum er tað hent, at tað eydnaðist at fáa eitt figgjarlógaruppskot upp á umleið 23 milj. kr., ið fólkaflokkurin og tjóðveldisflokkurin hildu vera nógv ov lágt sett, niður í umleið 18 milj. kr. — t. v. s., ein storri skatta- og tolllætti enn nakrantíð áður er framdur her á landi.

veitst tú

AT amerikanskir visindamenn hava funnið fram til, hvussu teir reiðiliga lættliga kunnu vinna stórar nogdir av góðum drykkivatni burtur úr sjógvi — 42 litrar burtur úr 100 litrum av sjógvi.

AT ongatíð tey seinastu 50 árini hava jarðskjáltarnir gjørt so nógv um seg kring um á jarðaknøttinum sum í 1960 — serstakliga í Marokko, Chile og Persiu.

AT jugoslaviskir jarðfrøðingar hava funnið beinagrindina av einum mamutti, ið teir halda hevur livað fyri um leið 1 milliard árum síðan og verið góðar 5 metrar høgur.

AT størri parturin av starvsfólkunum í amerikanskum bankum er konufólk — 380.000 konufólk og 180.000 mannfólk.

AT av teimum 52 miljónum íbúgvunum í Bretlandi starvast bert 1 milj. í landbúnaðinum.

ey Gað

»GLAÐUSTROK«, ið er sera ágrýtið at verja núgaldandi rúsdrekkalóg sammetir drykkjulag Føroyinga við drykkju lagið í øðrum londum og skrivar um hetta:

»Veruleikin er jú tann, at vit Føroyingar eru tað mest edrúuliga fólkið í Norðanlondum, ja, kanska í allar Europu, og tað er rúsdrekkalógini at takka fyri«

Og víðari skrivar blaðið um alkoholnýtslu av øðrum slagi enn vanligum rúsdrekka, ið innflutt verður:

»So er tað heimabrygging, smugling, drekking av hárvatni, alt hetta vita vit fer fram, men ikki meir enn í øðrum londum.....«

hugskot



KHRUSCHEV segði nýliga í stórarí røðu, hvørjar hugsjónir sínar vóru:

»Vit vilja vera eydnusælir, tá ið mannaættin søkir sær skjól undir marxismunnar og leninismunnir skjøldri, og tá ið kommunistiska flaggið veitrar yvir heiminum og einum heimsumfarandi kommunistiskum samfelagi. Figgindar okkara siga, at eg pástandi, at kommunisman vil sigra. Hetta er eingin pástandur, hetta eru vit fullvísir í. Tað er einki ringt í hesum, tvørturimóti, tað er nakað gott. Kommunisman er javnaður fyri øll fólk. — uttan mun til lit!«

Mangt

»FØROYINGAR UNDIR JØRÐINA,« soleiðis eitur grein í danska blaðnum AKTUELT, ið hevur havt samrøðu við A. Noe-Nygaard, professara, sum síðan 1938 saman við Jóhs. Rasmussen, jarðfrøðingi, hevur havt við jarðfrøðisligu kanningarnar í Føroyum at gera. Komið er nú so langt ávegis, at hin fyrsti sættipargurin av teimum jarðfrøðisligu kortunum nú fer til prentingar. Um kola nøgdirnar sigur hann m. a.:

— Vit hava funnið so nógv kol, sum menn gitta um í 18. old. Tað er fyrst í 19. old. at tolini byrja at vaksa — frá 25 til 50 og 75 milj. tons. Elstu kanningarnar sogdu frá 12 milj. tonsum, og hetta úrslit eru vit eisini komnir til. Ein fronsk kanning frá 1908 setti nøgdina til 12 milj. tons, og tað var tá franski Marquis De Saint Yves av Paris keypti sær einkar rættindini at bróta kol í Føroyum — men einki spurdist burtur úr hesum og kolaútflutning úr Føroyum kann ein valla hugsa um, so leingi kolaumstoðurnar í Europu eru sum í lotuni.

* * *

BERGHOLSGERÐIRNAR viðger Noe-Nygaard, professari eisini. Hann heldur jarðfrøðisligu kanningarnar hava verið av alstórum týdningi fyri tær mongu berggongdirnar, ið longu eru gjørdar, serstakliga tær til vatnleiðingar, har hin longsta er 1,5 km. Hann leggur aftrat:

— Hin sætta berggongdin, sum nú verður gjørd, verður 900 m long og 2 ferðir 2 m í tvørmát. Men heraftrat verður nú farið undir eina 1200 metur langa — samferðsluholið millum Tvoroyri og Hvalba. Hetta verður 4 ferðir 4 metur í tvørmát og verður at liggja fleiri hundrað metur niðri í fjallinum.

* * *

RÚMDARKANNINGAR. Fyrst í 1960 søgdu russiskir visindamenn frá teirra ætlanum tey komandi 7 árini. Fyrsta stóra stigið var tá at senda ein mann kring um knøttin og fáa hann niður aftur. Hetta hendi nú seinasta mikudag.

Næsta stigið verður at lata eitt rúmdarskip við manni í ferðast kring um knottin í fleiri samdogur. Triðja stigið verður at senda mannað rúmdarskip kring um mánan. Fjórða at senda ómannað rúmdarskip uppá og fimta: at lata mannað rúmdarskip lenda á mánanum.

* * *

KOMMUNISMAN. Í Kina (650 milj. íbgv.), Ruslandi (200 milj. íbgv.), Pólandi, Tjekkoslovakiu, Ungarn, Rumeniu Bulgariu, Albaniu, Eysturtýskland, Norðurkoreu og Norðurvietnam hava kommunistar vaðið einsamallir. Onnur lond eru á veg at gerast kommunistisk ella halla politiskt mest tann vegin.

Oðrvísi er í ikki-kommunistiska partinum í Europa. Í Vesturtýskland, Grikkaland, Spaniu og Portugal eru kommunistaflokkarnir bannaðir.

Vit endurprenta her seinastu kendu valtølini, ið vísa stødd kommunistanna í mun til samlaða veljaratalið í nøkrum londum:

	atkv.	tingm.	pst.
Finland	445.832	50	23.17
Italia	6.700.812	140	22.7
Frakland	3.741.384	10	20.7
Ísland	13.621	10	19.2
Luxembourg	211.472	3	8.9
Holland	272.054	4	6.75
Sveriki	186.762	5	5,0
Noreg	60.275	1	3.38
Eysturriki	142.598		3,27
Danmark	27.298		1,14
Bretland	33.144		0,1

* * *

7000 Eysturtýskarar valdu í náskaðognum at flyta um mark og búseta seg í Vesturtýskland, har arbeiðs- og livilíkindini eru reiðiliga betri enn eystanfyri jarntjaldið.

Beinaaverin sum heimsbardagin var lokin í 1945, byrjaði flóttarstrevnurin — og hann hevur staðið lagnt við síðan tá. Í alt eru nú 4 milj. Eysturtýskarar fluttir vestur um jarntjaldið. Eitt úrslit av hesum er, at Eysturtýskland er einasta land í heiminum, hvr fólkatalið ikki stendur við men minkar

* * *

HEIMSINS STØRSTU. Føroyski blaðheimurin er lítið at meta aftur ímóti bløðunum aðrastaðni bæði í stødd og í nøgdum. Tað eru sjálvandi stórbýirnir í stórlondunum, ið hava tey størstu bløðini. Niðanfyri er stutt yvirlit yvir, hvussu stórt dagliga upplagið er hjá nøkrum kendum bløðum:

	eintok:
Pravda, Moskva	6.300.000
Daily Mirror, London	4.500.000
Daily Express, London	4.130.000
Asahi Shimbum, Tokio	3.750.000
Bild Zeitung, Hamburg	3.289.000
New York Daily News	2.030.000
France Soir, Paris	1.460.000
The Daily Telegraph, London	1.170.000
New York Times	614.000

* * *

16 ÁR AFTANÁ. Formaðurin fyri jødunum, ið giordust avlamnir undir nasistisku forfylgilsisinum, sigur tað vera skilaleyst av israelska figgjarmálaráðnum at gjalda 140.000 kr. úr israelska landskassanum til at verja Eichmann og leggur aftrat:

»8. tað er skilaleyst at nýta pening skattaborgaranna at gjalda verju teirra egnu mordara. Vit, hansara offur — líkamliga og sálarliga brekaðir — banka framvegis — 16 ár aftaná heims bardagan — upp á dyrnar hjá figgjarmála ráðharranum fyri at fáa okkara skaðabotur, so vit kunnu lekja okkara sár og koma at liva eitt hampa liv...«

* * *

SOMU LØN. Síðan arbeiðararørslan tók seg upp, hevur eitt aðalkrav hennara verið, at menn og kvinnur í sama arbeiði skulu fáa somu løn. Onkunstaðni er hetta hent, men bert sum ein viðfáingur í mun til hina samlaðu arbeiðarafjøldina.

Nú eru arbeiðarar og arbeiðsgevarar í Noreg komnir ásamt um, at í 1967 skal sama løn verða galdandi fyri menn og kvinnur á ollum arbeiðsøkjum. Henda lønjavningin byrjar í 1963.

* * *

NIXON. Ein maður kom nú um dagarnar inn á sakforaraskrivstovu Nixon's í Los Angeles. — Sum kunnugt var Nixon, amerikanskur varaforseti og valevni til seinasta val, men tapti. — Maðurin segði Nixon frá, at hann hevði mist 50 dollar uppá hann. »Eg helt uppá tygum í einum veddimáli.«

— Tað var synd, segði Nixon, men eg tapti mangt slíkt. Eg roknaði við at kunna flyta inn í Hvíta húsið, men í dag havi eg ikki so frægt sum eina leyligheit. Eitt hampa holi er ringt at finna, men nú kemur konan at hjálpa mær...«

* * *

Tað var ein kendur franskmaður, ið einaferð talaði um skatt, og segði:

— Kunsturin at áleggja skatt er at royta gásina soleiðis, at ein fær hina storstu mongdina av fjoðr við so lítlum skriggi sum gjørligt.

* * *

Pætur: Eg kann ikki sova, tá eg drekki øl.

Hanus: Sø er tað umvent við mær. Eg kann ikki drekka øl, meðan eg sovi.

NORÐOYA SPARIKASSI

Bf. 5043 — stovnaður 1919 — Bf. 5043

Sparikassin er opin kl. 10—12 og 14—16, leygardag 10—12½.

Lán verða givin móti veð í jørð og bygningum.

Renta av innskoti er 3½ % p. a. og av innskoti uppá uppsøgn 4 % p. a.